# Nú sigur Poul Michelsen stopp

**Poul Michelsen, løgtingsmaður, setir treytaleys krøv fyri at hann skal kunna taka undir við ætlanini um at gera Postverkið til Alment Partafelag**

ALMENT PARTAFELAG
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*




*– Sum støðan er nú, fer Postverkið at fáa lætt spæl at drepa alla kapping. Tí er tað eitt ófrávíkiligt krav, at ætlanin hjá landsstýrinum verður broytt, tí annars fáa kappingarneytarnir ikki eitt bein til jørðina, sigur Poul Michelsen*

– Nú sigi eg stopp.

Poul Michelsen er løgtingsmaður fyri Fólkaflokkin og sostatt er hann í samgonguni.

Men hann góðtekur undir ongum umstøðum ætlanina um at gera Postverk Føroya til eitt alment partafelag, soleiðis sum málið liggur í løtuni.

Gekst sum ætlað, skuldi partamaður hansara, Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, leggja lógaruppskot fyri tingið í gjár um at gera Postverkið til alment partfelag.

Tað hevur Poul Michelsen als onki ímóti.

Men hann góðtekur als ikki, at samgongan ætlar at geva Postverkinum so góðar sømdir, at tað fer at vera barnamatur hjá postverkinum at køva alla kapping á økinum.

– Tað góðtaki eg als ikki og tað verður eitt ófrávíkiligt krav, at skal Postverkið gerast til alment partafelag, skal tað gerast soleiðis, at kappingarneytarnir hjá tí fáa ein ærligan møguleika at kappast við Postverkið.

### Fáa 92 milliónir fyri onki

Poul Michelsen vísir á, at nú Postverkið skal gerast til alment partafelag, setti tað almenna fyrst 21 milliónir í partapengum í partafelagið.

– Men tað er eisini ætlanin, at partafelagið skal fáa allar ognirnar hjá postverkinum fyri einki. Ognirnar eru mettar at vera 92 milliónir krónir verdar.

– Sostatt fær tað nýggja partafelagið Postverkið eina innspræning uppá 92 milliónir í eginpeningi, uttan at betala eitt oyra aftur fyri og uttan at nakrar treytir verða lagdar við.

– Tað fer at geva Postverkinum lætt spæl at køva alla kapping á økinum, tí kappingarneytarnar hava verið noyddir at betalt fyri tey rakstrargøgn, teir hava at reka fyritøkurnar við.

Tí krevur Poul Michelsen, at lógin um at gera Postverkið til alment partafelag, verður broytt, so at kappingin verður á jøvnum føti, uttan at Postverkið fær ein órímiligan fyrimun við teimum sersømdum, sum landsstýrið ætlar at geva tí.

– Tá ið málið fer til viðgerðar í vinnunevndini, fari eg sostatt at krevja, at ætlanin verður broytt, so at tað verður javnvág ímillum tær treytur, sum Postverkið fær at virka undir og tær treytur, sum kappingarenytarnar virka undir.

### Skulu taka lán

Poul Michelsen kundi hugsa sær, at Postverkið fær ognir fyri tað, sum kanska svarar til einar 50 milliónir frá tí almenna, men at restin verður eitt lán, sum partafelagið Postverkið skal betala landskassanum aftur eftir vanligum marknaðartreytum.

– Fær Postverkið 50 milliónir fyri onki, má tað kunna forrenta 40 milliónir undir vanligum treytum.

Poul Michelsen vísur á, at nú Postverkið verður gjørt til alment partafelag, hevur stjórin boðað frá, at ætlanin er at fara í kapping á økinum og at tað fer eisini at kappast á økjum, sum ikki hava verið mett sum vanligur postflutningur.

Tí heldur løgtingsmaðurin, at tað neyðugt at gera eina púra neyva útgreining av, hvat postflutningur umfatar.

– Og fer partafelagið Postverkið útum tað, sum er postflutningur, skal tað eisini missa einkarrættin, sum tað nú hevur til øll brøv, sum viga minni enn 100 gramm.

– Hesi brøvini, sum viga minni enn 100 gramm, er nógv tann størsti parturin av flutninginum og tað hevur Postverkið einkarrætt tað. Og fer Postverkið í kapping við privatu feløgini á økinum, skal tað eisini missa einkarrættin til brøvini undir 100 gramm.

Varðveitir Postverkið einkarrættin til brøvini undir 100 gramm, er tað ein trygg inntøka, sum er nóg mikið til at halda lív í partafelagnum ímeðan tað undirbjóðar kappingarneytunum á øðrum økjum og tað er ikki jøvn kapping.

Í triðja lagið verður eisini alneyðugt at fáa greiði á spurninginum um mvg.

– Í hesum sambandi má greiða fáast á, hvat er postur og hvat er farmur. Ger postverkið av at definera ein flutning sum postflutning, skal onki mvg gjaldast. Men verður flutningurin defineraður sum farmaflutningur, skal mvg gjaldast.

Poul Michelsen sigur, at tað verður bara Postverkið, sum fær møguleikan sjálvt at definera um ein flutningur er mvg fríur postflutningur ella mvg skyldugur farmaflutningur og tað góðtekur hann ikki.

– Væl hevur Postverkið nakrar almennar skyldur, men tað eigur tað at klára við teimum 50 milliónunum, tað fær fyri onki.

Tá ið uppskotið kemur til viðgerðar í vinnunevndini, verður tað eisini neyðugt at privatu feløgini sleppa á fund við Vinnunevndina, har tey fáa høvi til at siga sína hugsan.

Og hann ger eisini púra greitt, at verða hesar broytingarnar ikki framdar, fer hann ikki at atkvøða fyri ætlanini og hann væntar at bæði restin av Fólkaflokkurin og restin av samgonguni, fara at hava somu støðu.

– Tað kann ikki vera áhugin hjá samgonguni at køva alla kapping á økinum við at geva Postverkinum so góðar sersømdir, at tað kappingarneytarnir ikki fáa eitt bein til jørðina, tí sum er, fáa teir ongan møguleika at yvirliva, sigur Poul Michelsen.

– Tosað verður nógv at at kapping skal vera á øllum økjum. Samstundis er líkt til, at vit skulu gera eitt privat partafelag við einum einasta endamáli og taðer at drepa alla kapping á økinum og tað kann ikki góðtakast, leggur hann afturat.

# Sjúkrarøktarfrøðingar hava stórmál á skránni

**Sjúkrarøktarfrøðingarnir hava aðalfund í dag og har fara tey at tosa um átrokandi mál**

SJÚKRARØKT
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Nógv átrokandi mál verða til viðgerðar á aðalfundinum í dag, sigur Jana H. Dalsgaard, forkvinnan í Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar*

Trotið á sjúkrarøktarfrøðingum, ískoytisútbúgving og sáttmálasamráðingar.

Hetta eru trý av teimum mest átrokandi málunum, sum verða til viðgerðar á aðalfundinum í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar hevur aðalfund á Hotel Føroyum í morgun, leygarmorgunin, klokkan 10.

Á aðalfundinum í dag er hvørki formansval ella nevndarval á skránni, tí tað var í fjør og hvørt valskeið er trý ár.

Men Forkvinnan í felagnum, Jana H. Dalsgaard, sigur, at fyri tað eru nógv stórmál á skránni.

Hon sigur, at aðalfundurin fer serliga at umrøða tað stóra trotið, sum er á sjúkrarøktarfrøðingum í Føroyum, tí tað er eitt álvarsmál, sum kann fara at fáa stórar avleiðingar, kemur ikki vend í.

Á fundinum fara tey eisini at tosa um ískoytisútbúgvingina, sum tað verður arbeitt við at seta í verk. Hetta er ein útbúgving fyri teir sjúkrarøktarfrøðingar, sum eru útbúnir eftir teirri gomlu skipanini.

– Skulu teir hava møguleika fyri víðariútbúgving, mugu teir hava eina ískoytisútbúgving og tað arbeiða vit við, sigur forkvinnan.

Hon leggur afturat, at í hesum sambandi verður miðað eftir at gera eina føroyska útbúgving.

Og triðja stórmálið á skránni eru sáttmálasamráðingarnar, sum skulu vera við Fíggjarmálaráðið í heyst.

## Aðalfundur hjá Tjóðveldisfelag

**Jónsvein Bjartason er nýggjur formaður í Eysturoyar Tjóðveldisfelag**

AÐALFUNDUR
*tíðindaskriv*

Aðalfundur varð hildin í Eysturoyar Tjóðveldisfelag týskvøldið. Fundurin varð hildin í húsunum hjá arbeiðarafelagnum Hæddini í Saltangará. Væl av fólki var møtt, og fundarfólkið frøddist um serliga góða valúrslitið í oynni á fólkatingsvalinum fyri stuttum. Virkað verður áhaldandi og treytaleyst eftir stevnu floksins, og felagið fegnast um, at semja er fingin í lag aftur eftir tað stríð, sum hevur verið í flokkinum í heyst og í vetur. Nývalda nevndin leggur til brots alt fyri eitt, og skipaði hon seg á nevndarfundi eftir aðalfundin.

Nývaldur formaður er Jónsvein Bjartason á Strondum.

Nevndin er annars mannað soleiðis: Andrea Eldevig, Fuglafirði, varaformaður, Árant Hansen, Norðragøtu, skrivari, Magni Joensen, Fuglafirði, varaskrivari, Herbert Olsen, Rituvík, peningarøkil, Olaf í Garði Joensen, Eiði, nevndarlimur og Kristbjørg Toftegaard, Skála, nevndarlimur.

Varalimir í nevndini eru: Hallur Ellingsgaard, Oyndarfirði og Jóannes Jóhannesen, Funningi.

Sambært viðtøkunum er formaðurin Jónsvein Bjartason nýggjur aðalstjórnarlimur og varamaður hansara er Andrea Eldevig.

Aðalfundurin valdi Magna Joensen, Andreu Eldevig, Olaf í Garði Joensen og Árant Hansen í Flokstingið. Varalimir eru Herbert Olsen og Jóannes Johannesen.

Fundarfólkið staðfesti, at flokkurin stendur sterkur í fólkinum í oynni. Hetta varð seinast staðfest á fólkatingsvalinum 8. februar, og miðvísa ætlanin er nú at styrkja hesa støðu frameftir. Helst soleiðis, at flokkurin røkkur tveimum umboðum í oynni á næsta løgtingsvali. Í dag eru 170 limir í felagnum.